# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundinum 24.06.2019*

**Bygdaráðsfundur 24.06.2019 kl. 18.00 til kl. 18.25**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd**: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Selma Hansen. skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 44/2019. Girðing vestanfyri fótbóltsvøllin**
J.nr 82.07.00-P20-1-15

**Málið bleiv tikið av skrá og koyrt aftur í Teknisku nevnd**

**Mál nr. 45/2019 Umsókn um tímar til serligan tørv í Barnagarðinum – Lukkað mál**
J.nr. 16.06.20-G01-2-19

**Mál nr. 46/2019 Val av nýggjum limi til barnaverndartænastuna við Skálafjørðin**
J.nr. 84.03.00-A00-1-16
**Málslýsing**
Rutt Olsen hevur í telduposti, 27. mai 2019, boðað Nes kommunu frá, at hon tekur seg úr nevndini fyri Barnaverndartænastuna við Skálafjørðin, pr. 1. juli 2019.

Rutt Olsen takkar fyri álitið, sum Nes kommuna hevur sýnt henni, sum nevndarlimi í Barnaverndartænastuni síðani 2010, nógvu árini sum forkvinna. Umframt Rutt Olsen, hevur Nes kommuna eisini valt Atla F. Johansen, sum nevndarlim í Barnaverndartænastuni.

Sambært viðtøkunum fyri Barnaverndartænastuna við Skálafjørðin, skulu 2 umboð í part fyri tær 3 kommunurnar við Skálafjørðin veljast í nevndina.

Sostatt skal Nes kommuna velja nýtt umboð í Barnaverndartænatuna fyri Skálafjørðin fyri tíðarskeiðið frá 1. juli 2019 til 31 des. 2020.

**Tilmæli**
Á fundi 20.06.2019 mælir Trivnaðarnevndin til at innstilla til bygdaráðið, at Annfríð Neslíð, sjúkrarøktarfrøðingur, Toftir, verður vald, sum nýggjur limur í nevndina í Barnaverndartænastuna fyri Skálafjørðin.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Trivnaðarnevndini bleiv einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 47/2019 Innkomin tilboð uppá uppíbygging av frítíðarskúlanum</u>**
<u>J. nr. 82.06.00-P20-1-17</u>
**Málslýsing**
11. juni 2019, kl. 15.00, blivu tilboðini uppá uppíbygging av Frítíðarskúlanum latin upp á kommunuskrivstovuni. Fuglark stóð fyri lisitatiónini.

*Útgreining:*
**Stórarbeiðstøka (meting kr. 5.674.000):**

| | |
|---|---|
| KBH Byggivirkið | 5.981.360,00 |
| Timburtænastan | 6.152.801,00 |
| Búsetur | 6.415.107,00 |

Harumframt var TN-bygging boðin við.

**HVS-arbeiðið (meting kr. 1.600.000):**

| | |
|---|---|
| Blikksmiðjan | 1.376.949,45 |
| Zacharias Leitisstein | 1.687.423,99 |
| RenoVent | 1.798.569,86 |

Harumframt var Maria Poulsen boðin við.

**El-arbeiði (meting kr. 529.000):**

| | |
|---|---|
| HD Electric v/Hans Arna Davidsen | 393.295,00 |
| El-Con | 447.404,76 |
| El-in | 508.087,22 |
| Rók-el | 573.884,81 |
| Maskinhandilin | 671.541,00 |

**Gólvarbeiði (meting kr. 185.800):**

| | |
|---|---|
| Colorama/Gólvmenn | 286.260,94 |
| Jim S | 322.951,00 |

**Málaraarbeiði (meting kr. 158.000):**

| | |
|---|---|
| AM-máling | 208.665,00 |
| Signar á Fríðufløtu | 215.196,00 |
| Málarin Sri (Poli Mohr) | 294.247,00 |

Harumframt var Málarameistari Magni Jacobsen og Málaratoymið v/ Steinar Hansen boðin við.

| | |
|---|---|
| Meting pr. 11/6-19 íalt | kr. 8.526.800,00 |
| Lægstu tilboð pr. 11/6-19 íalt | kr. 8.246.530,39 |

Tilboð uppá byggibúningina komu inn áðrenn hósdagin 31.01.2019 kl. 13.00. RTS hevði lægsta boðið uppá kr. 475.600. Metingin var kr. 300.000.

Umframt omanfyrinevndu tilboð skal leggjast afturat kostnaðinum: Projektering og ráðgeving, innbúgv, meir- og minniveitingar; meirynskir, prís- og lønarvøkstur og kommunu-mvg. Kostnaðarmeting pr. 22.11.2018 bleiv gjørd upp til kr. 11.181.033.

Fuglark og teirra fagráðgevarar hava gjøgnumgingið innkomnu tilboðini eisini við atliti til sparingar. Fuglark mælir Nes kommunu til at taka av teimum lægstu tilboðunum, sum eru innkomin.

Í mun til innkomnu tilboðini er samlaði metti kostnaðurin nú kr. 11.696.803.

**Tilmælir**
Fuglark mælir til, at Nes kommuna undirskrivar sáttmálar við hesar veitarar:

**RTS** – Útgrevstur og planering
**Byggivirkið KBH** – Stórarbeiðstøka,
**Blikksmiðjan** – HVS arbeiðið
**HD Electric** – El arbeiðið
**AM Máling** – Málaraarbeiðið
**Colorama/Gólvmenn** - Gólvarbeiðið

Á fundi 20.06.2019 mælir Trivnaðarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Fuglark.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Trivnaðarnevndini bleiv einmælt samtykt.

**Mál nr. 48/2019 Graviloyvi Frítíðarskúlin**
J. nr. 82.06.00-P20-1-17
**Málslýsing**
Í sambandi við útbygging av verandi Frítíðarskúla á Brekkukletti, søkir Fuglark vegna Nes kommunu um graviloyvi. Víst verður til viðlagdar tekningar.

**Avgerð**
Á bygdaráðsfundi samtykti bygdaráðið at játtað graviloyvi samb. viðløgdum tekningum.

**Mál nr. 49/2019 Jarðarmál til ummælis**
J.nr. 01.04.002-P20-01-18

**Málslýsing**
Tann 1. november 2018 kemur eitt jarðarmál frá Umhvørvisstovuni til ummælis hjá Nes kommunu. Talan er um eina umsókn frá borgara um marknaumskipan millum grundøkir.

Samskifti hevur verið millum borgaran og teknisku deild hjá Nes kommunu um umsóknina, og tann 11. mai 2019 móttekur Nes kommuna nýggja umsókn, har markalinjurnar og víddir eru broyttar í mun til upprunaligu umsóknina.

Leiðarin á teknisku deild mælir frá sundurbýti, við atliti til, at grannamatrikkulin verður við skerdan lut í mun til dagføringar í komandi tíðum. Her verður hugsað um útbygging, parkerings møguleikar, og uttanum økið sum heild.

**Tilmæli**
Á fundi tann 12.06.2019 mælir Tekniska nevnd til at taka undir við tilráðingini frá teknisku deild, um ikki at geva loyvi til marknaumskipan.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd bleiv einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 50/2019   Áheitan um uppíbygging í egningaskúrðin</u>**
<u>J.nr 82.07.00-P20-1-19</u>

Málið bleiv tikið av skrá og koyrt aftur í Teknisku nevnd.

**<u>Mál nr. 51/2019   Loyvi til uppíbygging</u>**
<u>J.nr. 02.34.02-P20-26-19</u>
**Málslýsing**
Í telduposti tann 3. juni 2019, søkir Alex Troleis um loyvi til uppíbygging av sethúsi teirra á Høganesvegi 21.

Ætlanin er at byggja út vestureftir, sambært skitsum sum liggja í málinum.

**Tilmæli**
Á fundi 12.06.2019 mælir Tekniska nevnd til at geva prinsipielt loyvi. Nágreinligar tekningar skulu fyriliggja áðrenn endaligt byggiloyvi verður givið.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd bleiv einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 52/2019 Heimild til Teknisku nevnd</u>**
<u>J.nr. 00.22.00-G01-2-19</u>
**Málslýsing**

Tekniska nevnd hevur undanfarin ár fingið heimild til at avgreiða átrokandi byggimál, og onnur teknisk mál í summarfrítíðini, og er ynski um, at soleiðis eisini verður í ár.

**Tilmæli**
Á fundi 12.06.2019 mælir Tekniska nevnd til, at nevndin fær heimmild at avgreiða átrokandi byggimál í summarfrítíðini.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Teknisku nevnd bleiv einmælt samtykt.

**Mál nr. 53/2019 Uppskot til val av limum í friðingarnevndir**
J.nr. 01.05.00-G01-1-19
**Málslýsing**
Skriv er komið frá Heilsu- og Innlendismálaráðnum viðvíkjandi vali av friðingarnevndum.

Heitt verður á Nes kommunu um at skjóta upp tvey umboð, eina kvinnu og ein mann.

**Tilmæli**
Á fundi 18.06.2019 mælir Fíggjarnevndin til at skjóta upp Marjun Gaardbo og Símun Johannesen sum valevni til Friðingarnevndirnar.

**Avgerð**
Tilmælið hjá Fíggjarnevndini bleiv einmælt samtykt.